# Hósdagur 11. mai

**Útvarp Føroya**

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Steingrím Niclasen í Havn lesur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.35 **Góðan Morgun Føroyar** - Hilmar Jan Hansen er vertur
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Steingrím Niclasen í Havn lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Tilvera - apopleksi** (e) Armgarð Arge leggur til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri
10.10 **Lurtarararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Romantiskur tónleikur** (e) Seinasta sending hjá Petur Birgiri Petersen
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen stílar fyri
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindi**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stíla fyri
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Mildrið Jacobsen stílar fyri
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Dalurin fagri** - 22. partur av skaldsøgu eftir Gunnar Hoydal. Hans Tórgarð lesur
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið** - Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Sjómanssendingin »Vitin«** (e)
14.30 **Barnalindin**
17.00 **M & M's** - Sending fyri tannáringar
17.55 **Dagsins orð**
18.00 **M & M's** heldur fram
19.00 **Brot og bitar**
20.00 **Barnalindin**
20.30 **Okkara dagliga breyð**
20.55 **Dagsins orð**
21.00 **Bønarlinjan** við ymiskum luttakarum
**Vit gevast uml. midnátt**

**Rás 2 FM 102**

8.00 **Morguntónleikur -** Lættur blandaður tónleikur
9.45 **Orðið -** Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Birgir Beinleiðis**- Beinleiðis sending við tónleiki og práti - Birgir Sondum leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Dansitónleikur fyri vaksin**
13.00 **Føroyskur tónleikur**
14.00 **Laila Beinleiðis** - Beinleiðis countrysending
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Lættur tónleikur**
16.00 **KT R@sin** - Kunnandi ungdómssending fyri ung og eldri. Um kunningartøkni í víðastu merking í samstarvi við Føroya Tele.
17.00 **Barnasangir**
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Lættur tónleikur**
19.00 **Hans og Dýrini** - Hans Joensen prátar við fólk um dýr, náttúru og umhvørvi
20.00 **Ungdómstónleikur**
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Orðið** (e) **-** Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 **GirlZone -** Beinleiðis ungdómssending við gestum. - Anita Ottosen, Ruth Reinert og Súsanna Clementsen leggja til rættis. - Telefon: 359999, fax 359990 ella E-mail: ras2@ras2.fo
24.00 **Góða nátt**

**svf**

18.30 **Øskufía** 18:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika við Grannum okkara**
20.50 **Krimitímin: Ruth Rendell** — tvær systrar 2:2
21.40 **Eiturkoppurin 3:6** - danskt krimi- og kærleiksdrama - Óhóskandi fyri smábørn
22.40 **Melodi Grand Prix Kavalkada** 2:3
23.10 **Ferðafrásøgn: Jamaica**
23.55 **Liðugt**

**Eurosport**

7.30 **Motorsports**
8.30 **Truck Sports**
9.00 **Martial Arts**
11.00 **Motorsports**
12.00 **Cart**
13.00 **Mountain Bike**
13.30 **Live - Ice Hockey**
15.56 **News**
16.00 **Tennis**
17.26 **News**
17.30 **Live - Ice Hockey**
19.56 **News**
20.00 **Motorsports**
21:00 **Boxing**
22.00 **News**
22.06 **Ice Hockey**
23.00 **Motorsports**
0.00 **Football**
0.30 **Close**

**TV3**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.05 **TV-shop**
9.00 **Hvide Løgne**
9.25 **Alle tiders barnepige**
9.55 **Baywatch**
10.50 **Horton-sagaen**
11.40 **Horton-sagaen**
12.30 **I lyst og nød**
13.00 **Sjov og Spas**
13.25 **Panter-tanter**
13.55 **Det lille hus på prærien**
14.50 **Interne affærer**
15.45 **Sjov og Spas**
16.15 **Ricki Lake**
17.10 **Dagens Nyheder på TV3**
17.20 **Sportsnyheder**
17.25 **Vejret**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Vild med dig**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Family Law**
20.00 **Jacob og Lotte på eventyr**
20.35 **Modelliv**
21.05 **Heksene fra Warren Manor**
22.05 **SexOrama**
22.40 **Dagens Nyheder på TV3**
22.50 **I lyst og nød**
23.20 **Vore værste år**
23.50 **Ti tommelfingre**
0.20 **Monty Pythons flyvende cirkus**
1.50 **Caroline, karrieren og kærligheden**
2.20 **Viruskrigerne**
3.15 **Hvide Løgne**
3.45 **Godnat**

**BBC World**

23.00 **News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**
0.00 **News – Weather**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **The Travel Show**
2.00 **News – Weather**
2.30 **Reporters**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **Top Gear**
6.00 **News – Weather**
6.30 **The Money Programme**
7.00 **News – Weather**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **News – Weather**
8.30 **Talking Movies**
9.00 **News – Weather**
9.30 **The Money Programme**
10.00 **News – Weather**
10.30 **HARDtalk**
11.00 **News – Weather**
11.30 **The Travel Show**
12.00 **News – Weather**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **News – Weather**
13.30 **HARDtalk**
14.00 **News**
14.15 **World Business Report – Weather**
14.30 **Top Gear**
15.00 **News – Weather**
15.30 **The Money Programme**
16.00 **News – Weather**
16.30 **Asia Today**
17.00 **News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **News – Weather**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **News – Weather**
20.30 **Click Online**
21.00 **News – Weather**
21.30 **World Business Report**
22.00 **News – Weather**
22.30 **Science World**
23.00 **News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC Prime**

23.00 **Family: »John Paul«**
1.00 **TLZ: »Come outside – Boots«**
1.15 **TLZ: »Come outside – Spiders«**
1.30 **TLZ: »Come outside – Buses«**
1.45 **TLZ: »Come outside – Apples«**
2.00 **TLZ: »Development Aid«**
2.30 **TLZ: »Ecological Predictions«**
3.00 **TLZ: »Materials: Strike a Light«**
3.30 **TLZ: »Containing the Pacific«**
4.00 **TLZ: »Deutsch Plus«**
4.15 **TLZ: »Deutsch Plus«**
4.30 **TLZ: »Deutsch Plus«**
4.45 **TLZ: »Deutsch Plus«**
5.00 **TLZ: »The Small Business Programme**
5.30 **TLZ: »Look ahead**
6.00 **Dear Mr. Barker**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Get your own back**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**1
7.55 **Style Challenge: »Leukaemia Awareness«**
8.20 **Real Rooms: »Warwick Farmhouse Kitchen«**
8.45 **Kilroy: »You're too old for one night:**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Roadshow**2
11.00 **TLZ: »The Contenders – Chariots of Fire«**
11.30 **Can't Cook, Won't Cook**2
12.00 **Going for a Song**1
12.25 **Real Rooms:** »49 **Leamington Reading Room**
13.00 **Style Challenge: »Q & A Fashion Forecasts«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Gardeners' World**1
14.30 **Can't Cook, Won't Cook**
15.00 **Dear Mr. Barker**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Get your own back**
16.00 **The Biz**
16.30 **Classic Top of the Pops**
17.00 **Last of the Summer Wine: »Beware the Vanilla Slice«**
17.30 **The Antiques Show**6
18.00 **EastEnders**
18.30 **Vets in Practice: »Affairs of the Heart**
19.00 **Keeping up Apperances**
19.30 **Chef**
20.00 **Casualty: »Not Waving But Drowning «**
21.00 **Ruby Wax meets: »The Spice Girls«**
21.30 **Classic Top of the Pops**18
22.00 **Don't leave me this Way**

*Rás 2 – Hósdagin kl. 20.00:*

## Knevlarnir

Ungdómssending, har teir lívligu Gunnar Mouritsen og Heini Poulsen hava gestir í útvarpsstovuni, spurningarkapping við góð-um vinningum, t.d. fløgur, konsertatgongumerki, "út at eta", skemt og rúgva av ungdómstónleiki.

*TV3 - Hósdagin kl. 20.00:*

## Jacob og Lotte på nye eventyr




Jacob Haugaard og Lotte Heise eru nú farin til eksotiska Thailand, har tey hava møguleika til at uppliva rættuligt marglæti, eins og tey fáa innlit í elligomlu siðvenjuna.

Tey bæði ferðafólkini koma bæði høgt upp á fílabaki og djúpt niður í havið, tá tey saman royna seg í kaving eftir vrakum. Eisini uppliva tey eitt rættuligt thai-nýggjár, men meðan hetta stendur á, missa tey hvønn annan burtur. Lotte villist og endar í einum bólki av gibbon apum, sum stjala nærum alt hon hevur við sær. Samstundis er Jacob staddur á hotellinum, har hann hugnar sær í øllum marglætinum, sum tey loyva sær í Thailandi.

*TV3 - Hósdagin kl. 20.35:*

## Modelliv



Katrine fer heim til mammuna fyri at vaska klæðir. Foreldirni eru fráskyld, og um kvøldið fer hon í býin, fyri at hoyra pápan spæla. Sjeikur hennara, Lars, greiðir frá, hvussu tað er at hava eina gentu, sum aðrir menn girnast.

Laura ger seinastu myndirnar í L.A., fyri síðani at fara á sightseeing. Kalda framfer hennara verður viðmerkt av einari aðrari gentu. Tue starvast á einum diskoteki um vikuskiftið, tí enn forvinnur hann ikki nóg mikið sum model.

*TV3 - Hósdagin kl. 21.05:*

## Heksene fra Warren Manor



Amerikonsk sendirøð.

Nýggju lestrarvinirnir há Phoebe nýta eina gandabók til at ganda ein grís, eina slangu og eina kanin til tríggjar flottar »dates«, sum tey kunnu hava við sær á valentine degnum. Romantisku dreyminir gerast tó til eina marru, tá tey trý fyrrverandi djórini brádliga leypa á onnur lesandi, meðan tey leggja ætlanir um, hvussu tey framhaldandi kunnu verða menniskju.

*TV3 - Hósdagin kl. 22.05:*

## SexOrama

Í dag verða í heiminum framleiddir fleiri pornofilmar enn vanligir filmar, men ofta hyggja fólk niður á sjónleikararnar í pornofilmunum. Hvat er tað, sum fær ungfók til at fara í hetta yrkið, og eru pornofokuseringin hjá pressuni positiv ella negativ hjá teimum, sum starvast á lakinum?



SexOrama fer nær at 19 ára gamla Ronnie frá Keypmannahavn, sum roynir at skapa sær eina yrkisleið í pornoheiminum. Hann greiður frá um heilt serliga krøvini, sum verða sett til bæði likam og sál, eins og hann heldur, at pengarnir eru ikki eins týdningarmiklir, sum seksuellu upplivingarnar hann fær undir upptøkunum.





Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum: www.sosialurin.fo

# B36 og HB hittast í fjórðingsfinaluni

***Løgmanssteypið:** Gøtumenn vóru leikliga omaná, men sigurin var tepur, og tað var um reppið, at HB javnaði í síðstu løtu*



*Eftir dysturin millum GÍ og HB fleiri ferðir hevur verið útsettur, varð hann endiliga avgreiddur mikukvøldið. GÍ vann dystin 1-0.*

Mikukvøldið eydnaðist tað endiliga at fáa útsetta dystin í bólkaumfarinum millum GÍ og HB frá hondini.

Gøtumenn vunnu 1–0, og tað vil siga, at teir vunnu bólk trý, meðan HB endaði á triðja plássinum. Úrslitið hevur við sær, at tað er greitt, at B36 og HB skulu hittast í einari av fjórðingsfinalunum. Tað er eisini greitt, at GÍ skal spæla á heimavølli í fjórðingsfinaluni.

Enn er tað ikki greitt, hvørjum GÍ skal spæla ímóti. Tveir dystir eru eftir í bólki eitt. VB skal spæla í Klaksvík í kvøld, og komandi mikukvøld skulu Sumba og VB spæla í Sumba.

Hóast bólturin er rundur, og tað aftur og aftur er sjón fyri søgn, at úrslitini ikki altíð eru tey, sum roknað verður við frammanundan, so er tað neyvan langt av leið, tá vit rokna við, at liðini fara at hittast soleiðis í fjórðingsfinalunum, sum verða spældar sunnudagin 21. mei: B36–HB, B68–NSÍ, KÍ–FS Vágar og GÍ–VB. Um VB vinnur sannførandi í Klaksvík í kvøld, so verður samansetingin øðrvísi.

**Støðan í bólki 3**

| Lið | d | v - j - t | Vunnin mál | Tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GÍ | 6 | 4 - 1 - 1 | 7 | 4 | 3 | 13 |
| 2 FSV | 6 | 3 - 2 - 1 | 6 | 6 | 0 | 11 |
| 3 HB | 6 | 3 - 1 - 2 | 3 | 6 | -3 | 10 |
| 4 TB | 6 | 0 - 0 - 6 | 0 | 0 | 0 | 0 |

### Spardu krútið

GÍ vann 1–0 móti HB, og tað mundi ikki vera so óvæntað. Á HB liðnum vóru bara fýra spælarar, sum taldust millum teir fyrstu ellivu móti KÍ. Hetta hevði sjálvandi við sær, at GÍ fyri tað mesta var spælstýrandi, men hetta boðaði eisini frá, at tað eru nógvir ungir og evnaríkir spælarar í HB. Og nú gera hesir nógv við tað, tí teir síggja møguleikar fyri at gera seg galdandi.

Einasta málið kom, tá knappur hálvur tími var farin. Súni Olsen sendi flatt hornaspark innfyri úr vinstru, og Bartal Eliasen stýrdi við beininum bóltinum í kassan.

Saman við Bartal Eliasen í miðverjuni var danin Martin Thomsen, sum vit umrøddu í blaðnum í gjár. Nýggi maðurin var sterkur og skjótur, og hann hevði góðan bóltførleika. Eftir dystin mikukvøldið skiltu vit á lagnum, at nýggi maðurin og nevndin hjá GÍ skuldu í gjár taka støðu til, um samstarvið skuldi halda fram. Um einki samstarv spyrst burturúr, so fer Martin Thomsen av aftur landinum í dag.

GÍ hevði fleiri aðrar møguleikar at gera mál, enn tann, sum teir skoraðu uppá, men teir fingu einki mál afturat. Bárður Johannesen var tryggur í málinum, og hóast spildurnýggja miðverju, sum var stýrd av liðformanninum Jóhannesi Joensen, so helt HB tætt.

Tá bara ein lítil løta var eftir, var tað um reppið, at Símun Eliasen javnaði fyri HB. Úr høgru sendi hann við vinstra beini fríspark á nærru samankomingina. Bólturin fór aftanfyri Sunvard Joensen, men hann fór ikki í málið.

Hesa ferð var Hans á Lag hjá HB leikbannaður. Tá HB komandi sunnudag fer til Runavíkar at spæla landskappingardyst, verður Hans Jørgen Djurhuus leikbannaður. Hans Jørgen, sum ikki hevur spælt nakað serligt á besta liðnum í ár, fekk reyða kortið, tá tað bara restaði ein lítil løta mikukvøldið.

JH

**Løgmanssteypið**
bólkur 3
3. mai

**GÍ–HB 1–0 (1–0)**
1–0: Bartal Eliasen
Dómari: Lassin Isaksen

**GÍ:**
Sunvard Joensen – Áslakur R. Petersen, Bartal Eliasen, Martin Thomsen, Súni Olsen – Magni Jarnskor, Jóan Petur Olsen, Helgi R. Petersen – Rúni Justinussen, Óli Hansen, Henning Jarnskor

**HB:**
Bárður Johannesen – Sámal Erik Hentze, Jóhannis Joensen, Hans Jørgen Djurhuus – Vagnur Mohr Mortensen, Hallur Danielsen, Rói Árting, Símun Eliasen, Pætur Dahl – Bárður Mortansson, Andrew av Fløtum

# Todi og teir royna aftur

***Superligan:** Við sigrinum mikukvøldið leyp FCK bukk um tvey lið. Úrslitið ber í sær, at Todi og teir framvegis hava møguleika at spæla seg í altjóða fótbólt*

Árið hjá FCK hevur ikki verið tað mest væl eydnaða. Tað er næstan ikki komið fyri, at teir hava vunnið tveir dystir á rað, og nú hava teir í langa tíð hingið á áttanda plássinum, sum tað hevur tókst sera torført at sleppa burturav.

Úrslitini hjá hinum liðunum hava eisini verið óstøðug, og tað hevur borið við sær, at FCK framvegis hevur havt møguleikan at blanda seg millum tey fýra fremstu, sum fáa atgongd til europeiskan fótbólt eftir summarfrítíðina.

Sunnudagin vann FCK 2–0 á útivølli á AB. Mikukvøldið vóru Todi og teir aftur í eldinum. Setningurin var at vinna á AGF á heimavølli. 8.598 eygnavitni sóu, at tað eydnaðist. Sunnudagin klokkan fýra seinnapartin verður dysturin millum FCK og AaB, sum verður spældur í Parkini í Keypmannahavn, vístur í TV3+. Tað er ikki so undarligt, at tað stendur nógv á teimum í FCK. Um tað eydnast teimum fyri triðju ferð upp í slag at vinna, so verða teir av álvara við í kappingini um fýra tey fremstu plássini.

FCK vann 2–1 á AGF, og tað hevði við sær, at FCK nú er á sætta plássi við 40 stigum. Viborg, sum er á fjórða plássi, hevur 42 stig, men teir hava spælt ein dyst færri enn FCK.

Mikukvøldið var FCK sera framrættað í útgangsstøðuni. Todi Jónsson, sum var á vøllinum í 85 minuttir, var ein av trimum í fremstu røð.

Christian Lønstrup setti hol á fyri FCK í 11. minutti. Hann skoraði beinleiðis uppá fríspark. Í 54. minutti skoraði Diego Tur, tá hann beindi frísparksinnleggi frá Niclasi Jensen í málið.

AGF, sum áðrenn FCK fekk fyrsta málið, hevði havt ein stóran møguleika, minkaði um munin í 73. minutti. Málskjútti var Carsten Hallum.

Síðstu løtuna royndi AGF at trýsta fyri at javna. Teir høvdu onkran góðan møguleika, men tað eydnaðist ikki at fáa mál og harvið at javna.

Burtursæð frá FCK og AGF so høvdu øll hini tíggju liðini í superliguni frí mikukvøldið. Komandi vikuskifti skal Herfølge spæla á heimavølli móti Lyngby. Hinir dystirnir, sum eru á skránni, eru Esbjerg–Brøndby, Silkeborg–Viborg, OB–AGF og AB–Vejle.

Brøndby hevur 46 stig, og AaB og Herfølge hava 44 stig. Viborg hevur 42 stig, og saman við FCK hava eisini Silkeborg og Lyngby 40 stig.

JH

**Støðan, danska Superligan**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby | 27 | 13 - 7 - 7 | 50 | 30 | 20 | 46 |
| 2 AaB | 27 | 11 - 11 - 5 | 47 | 28 | 19 | 44 |
| 3 Herfølge | 27 | 13 - 5 - 9 | 39 | 41 | -2 | 44 |
| 4 Viborg | 27 | 12 - 6 - 9 | 41 | 40 | 1 | 42 |
| 5 Silkeborg | 27 | 11 - 7 - 9 | 42 | 29 | 13 | 40 |
| 6 FCK | 28 | 12 - 4 - 12 | 40 | 32 | 8 | 40 |
| 7 Lyngby | 27 | 12 - 4 - 11 | 41 | 41 | 0 | 40 |
| 8 AB | 27 | 10 - 8 - 9 | 37 | 32 | 5 | 38 |
| 9 OB | 27 | 8 - 9 - 10 | 28 | 35 | -7 | 33 |
| 10 AGF | 28 | 8 - 7 - 13 | 31 | 43 | -12 | 31 |
| 11 Vejle | 27 | 6 - 10 - 11 | 34 | 53 | -19 | 28 |
| 12 Esbjerg | 27 | 6 - 4 - 17 | 29 | 55 | -26 | 22 |